# Havhestatíðin nærkast í stórum

**Hetta er tíðin, tá ið menn, sum ætla sær at taka havhest á sjónum, rigga seg til í bátinum og neystinum**

HAVHESTUR

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Líradagur er 26. august, og tá plagdu menn at draga líra í oyggjum, har skrápur eigur.

Men hetta er eisini tíðin, tá ið teir, sum ætla sær at taka havhest á sjónum, eru farnir at rigga bátarnar til. Glúpurin skal finnast framaftur, og somuleiðis skal gass og salt keypast. Íløt og annað skal verða klárt, tá ið teir fyrstu feitu fuglarnir liggja inni á gólvinum í neystinum ella í skúrinum.

Enn er ov tíðliga at gera fyrsta túrin, men seinni í hesi vikuni loysa ivaleyst teir fyrstu bátarnir og stevna út á hav.

Besta tíðin er vanliga um mánaðarskiftið, august/september.

Havhestatíðin er ein hugnalig tíð. Menn sita í neystunum og royta og svíða, og svidnaroykurin sker í næsarnar kring um í bygdini.



*Her liggur ein havhestabátur norður úr Ennibergi*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Tað eru teir, sum royna at tjena sær nøkur oyru í havhestatíðini – og so eru tað aðrir, sum bara hugsa um at taka sær til húsbrúks.

Veðrið hevur alt at siga, hvussu hendan tíðin vignast.

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 34, 2005
www.kaupthing.fo

# Oljan lækkað 5%

MARKNAÐARRÁK

Aftaná fleiri vikur við hækkandi oljuprísi, lækkaði hesin umleið 5% í farnu viku, hóast tað varð kunngjørt, at minni var í oljugoymslunum enn væntað. Hetta kann týða uppá, at ágangandi prísásetingin seinastu vikurnar í størri mun hevur verið stýrd av spekulativum oljuhandlum. Dollarin er styrknaður mótvegis evruni seinastu vikuna m.a. tí vinnuálitistøl úr New York og Philadelphia gjørdist betri enn væntað, samstundis sum arbeiðsmarknaðurin í USA sýnist stinnur. Hetta hevur økt um rentumunin millum tey amerikansku og evropiski lánsbrøvini og eru útlit til at hesin kann økjast enn meiri.

## Lánsbrævarentur lækkaðar

Fyri aðru viku á rað lækkaðu lánsbrævarenturnar. 10-ára danska rentan er lækkað til 3,18% og nærkast tískil skjótt lægsta rentustignum í longri tíð. Tað kann tykist løgið at rentan er lækkað seinastu tvær vikurnar, tá jaligu amerikansku búskapartølini verða havd í huga. Lánsbrævarenturnar eru nú á einum týdningarmiklum vegamóti, har gongdin hendan mánaðin kann avgera, hvussu rákið verður komandi tveir mánaðirnar.

## TDC hækkaði munandi

Fríggjadagin hækkaðu norðurlendsku partabrævamarknaðirnir aftur, so vísitalið liggur eitt sindur hægri enn fyri viku síðan. Telefyritøkan TDC hækkaði heili 15% mikudagin, tá gitingar vóru frammi um at hon møguliga verður seld privatum íløgufelagi sum hevur sýnt áhuga. Um so verður kann væntast at hvørt partabrævið verður selt fyri gott 350 kr, umleið 13% hægri enn ídag. Partabrøv standa seg framvegis væl, hóast oljuprísurin fyri 2006 er uppmettur.

## Hesa vikuna

Amerikanski tjóðbankastjórin Alan Greenspan, ið fer á røðarapallin hesa vikuna, kann møguliga ávirka lánsbrævarenturnar. Annars er sera soltið við lyklatølum av týdningi hesa vikuna. Marknaðirnir fara at hava eyguni við gongdini í oljuprísinum, og hesin kann tí lættliga ávirka gongdina á rentum og partabrøvum.

**Donsk 10-ára rent**




**Vísital fyri norrøn partabræ**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 613,57 | 2,3% | ↑ |
| JPY | 5,55 | 1,3% | ↑ |
| GBP | 1.101,40 | 1,2% | ↑ |
| NOK | 93,31 | -1,1% | ↓ |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 104,44 | 0,5% | ↑ |
| Evru Lánsbrøv | 174,53 | 0,0% | → |
| Norrøn Partabrøv | 99,59 | -0,1% | ↓ |
| Altjóða Vøkstur | 66,45 | 0,0% | → |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*